# Bráðsjúku-
# trygging

BANKNORDIK

**Bráðsjúka**

Álvarslig sjúka kann hava fíggjarligar fylgjur. Vit bjóða tær eina trygging, sum veitir útgjald í sambandi við álvarsliga sjúku, og sum sostatt tryggjar teg fíggjarliga, skuldi sjúka borist á.

**Børn**

Hevur tú børn, fevnir tryggingin eisini um børn tíni frá føðing, til tey eru 18 ár, um tey fáa eina álvarsliga sjúku. Talan er bæði um biologisk og ættleidd børn hjá tær og hjá tínum hjúnafelaga ella sambúgva.

**Hvør kann tekna Bráðsjúkutrygging?**

Bráðsjúkutrygging verður teknað sum ískoyti til eina Bólkalívstrygging ella eina Restskuldartrygging. Tað er tí ein treyt fyri at tekna Bráðsjúkutrygging, at tú eisini hevur Bólkalívstrygging ella Restskuldartrygging frá BankNordik við eini tryggingarupphædd á í minsta lagi 500.000 kr.

Harumframt skalt tú vera millum 18 og 51 ár, og tú skalt kunna útflýggja eina nøktandi heilsuváttan. Tryggingarfulnaðurin heldur uppat, tá tú fyllir 67 ár, og fyri børnini, tá ið tey fylla 18 ár.

**Prísur og tryggingarupphæddir**

Tú kanst velja eina tryggingarupphædd á annaðhvørt 100.000 kr. ella 200.000 kr. og tilhoyrandi tryggingarupphædd fyri børn, sum er ávikavist 60.000 kr. ella 120.000 kr. Upphæddin verður útgoldin, um sjúkan verður staðfest í tryggingartíðarskeiðnum, og um tú lýkur tryggingartreytirnar. Eingi krøv eru til, hvussu peningurin skal nýtast.

| | | |
|---|---|---|
| Tryggingarupphædd | 100.000 kr. | 200.000 kr. |
| Børn | 60.000 kr. | 120.000 kr. |
| **Gjald um mánaðin** | **67,00 kr.** | **134,00 kr.** |

**Útgjald**

Útgjaldið verður goldið út í einum, um tú fært staðfest eina av teimum sjúku, sum tryggingin fevnir um. Tryggingarupphæddin verður útgoldin skattafrítt.

Neyvari treytir fyri útgjald, hvørjar sjúkuavgerðir eru fevndar og undantøk eru at finna í tryggingartreytunum fyri Bráðsjúkutrygging. Hevur tú, áðrenn tryggingartíðin byrjar, fingið staðfest eina álvarsliga sjúku, er henda sjúkuavgerð ikki fevnd av tryggingini.

BankNordik

Telefon 330 330
Telefaks 316 950

kundi@banknordik.fo
www.banknordik.fo